# Fróði Benjaminsen var bestur

**ÁRSINS LEIKARI Fróði Benjaminsen varð kosin ársins fótbóltsspælari 2010 í Hvonn Live leygarkvøldið. Stríðshugaði liðformaðurin hjá HB hevur uppiborið heiðurin, heldur viðmerkjari**

Uni Holm Johannesen

Hann hevur verið føroyska útgávan av »Captain Fantastic« seinastu árini.

Stríðsmaðurin hjá HB við sjey-talinum á rygginum.

Umframt føroyameistara-heitið, hevur hann nú aftur vunnið eina heiðursløn. Hesaferð sum einstaklingur.

Fróði Benjaminsen er kosin ársins fótbóltspælari. Tað er annað árið upp í slag.

Helgi L. Petersen er fótbóltsviðmerkjari.

Hann heldur, at Christian Høgni Jacobsen, NSÍ, hevur eisini verið eyðsýndur í hesum kappingarárinum, men Fróði Benjaminsen hevði munin.

– Trýstið økist á leikararnar og liðini, sum kappingin sansar at. HB, EB/Streymur og NSÍ kappaðust um meistaraheitið seinastu umførini. Runavíkingar mistu fleiri týðandi stig í seinastu umførunum. HB dugdi best at handfara trýstið. Tað sigur heldur ikki lítið um Fróða Benjaminsen, at hann er høvuðsorsøkin til, at HB endurvann føroyameistaraheitið. Hann hevur verið besti spælarin í Vodafonedeildini í ár, sigur Helgi L. Petersen.

Fróði Benjaminsen er staddur uttanlands í løtuni, og hann kundi tí ikki taka móti heiðrinum.

Landsliðsleikarin sigur í stuttari viðmerking, at tað er altíð stuttligt at fáa slíkt herðaklapp.

### Stoltur pápi

Harry Benjaminsen, pápi Fróða, tók móti steypinum hjá soninum leygarkvøldið.

Hann er sjálvsagt errin av soninum.

– Tað hevði verið stuttligari at staðið her, um tað var eg, sum var kosin ársins spælari. Tað er helst nakað seint nú. Fróði hevur altíð verið ágrýtin og lagt nógva orku í fótbóltin. Hann fór at spæla við bóltin sum tvey ára gamal, og hann hevur nærmast ikki slept honum síðan, sigur Harry Benjaminsen, sum hevur sæð flestu dystirnar hjá Fróða í ár.

Harry Benjaminsen sigur, at sonurin hevur fleiri eginleikar sum fótbóltsspælari.

– Fróði er stríðshugaður, og hann hevur gott bólteyga. Hann er heldur ikki egoistiskur, og hann kennir sín leiklut sum liðspælari, sigur Harry Benjaminsen.

Fróði Benjaminsen hevur vunnið heiðurin sum ársins fótbóltsspælari tríggjar ferðir. Tað var í 2001, 2009 og 2010.

**ÁRSINS LEIKARAR:**
RANNVÁ ANDREASEN, KÍ,
FRÓÐI BENJAMINSEN, HB

**ÁRSINS VENJARAR:**
BIRNIR HAUKSSON, SKÁLA,
HEÐIN ASKHAM, EB/STREYMUR

**ÁRSINS STJØRNUSKOT:**
MARIA K. THOMSEN, KÍ,
ERLING JACOBSEN, VÍKINGUR

**TOPPSKJÚTTAR:**
RANNVÁ ANDREASEN, KÍ,
ARNBJØRN T. HANSEN, EB/STR.

**ÁRSINS MÁLVERJAR:**
RANDI WARDUM, KÍ,
ANDRÁS GANGÓ, NSÍ



*Ársins stjørnuskot, Erling Jacobsen og Maria K. Thomsen*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Erling er stjørnuskotið

**ÁRSINS STJØRNUSKOT Erling Jacobsen spældi sín fyrsta landskappingardyst, tá Víkingur vann 3-1 í Gundadali tann 29. juli. Fýra mánaðir seinni er hann kosin ársins stjørnuskot**

Uni Holm Johannesen

Erling Jacobsen fekk gjøgnumbrotið, tá hann brádliga varð tveittur fyri leyvurnar í landsdystinum móti Norðurírlandi. Erling røkti plássið sum vinstri bakkur.

Hann var millum mest eyðsýndu á føroyska liðnum.

Erling Jacobsen skifti til Víking í summarsteðginum, og hann loysti Atla Gregeren av sum miðverji.

– Eg hevði ikki spælt í miðverjuni áðrenn, so tað var ein avbjóðing. Tað hevur gingið hampiliga væl, men vit skuldu fingið meira burturúr í ár, sigur Erling Jacobsen.

uni@sosialurin.fo

# – Nú skulu vit koppa KÍ

**ÁRSINS VENJARI Íslendski Birnir Hauksson, Skála, er kosin ársins venjari hjá kvinnum. Nú er málið at gerast føroyameistari**

Uni Holm Johannesen

Skála fekk bronsuheiðursmerki í landskappingini og tapti steypafinaluna móti KÍ.

Birnir Hauksson er nøgdur við úrtøkuna í ár.

– Úrslitið var betri, enn eg hevði væntað. Nú fyrireika vit okkum til komandi kappingarár, og KÍ skal koppast av trónini, sigur hann.

Birnir Hauksson hevur føroyska damu, og tí er hann í Føroyum. Hann hevur áður roynt seg sum ungdómsvenjara í Íslandi og í Danmark.



*Birnir Hauksson, Skála venjari*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

– Tað var ein spennandi avbjóðing, og eg tók fegin av, tá eg var biðin at vera venjari á Skála, sigur hann.

**10. ÁRIÐ UPP Í SLAG**

SKIPAÐI SOSIALURIN FYRI ATKVØÐUGREIÐSLU, HAR VENJARAR OG LIÐSKIPARAR, SAMAN VIÐ UMBOÐUM FYRI FJØLMIÐLARNAR, FUNNU FRAM TIL BESTU FÓTBÓLTSAVRIKNI Á ÁRINUM. UNDAN HESUM HØVDU BÆÐI SOSIALURIN OG DAGBLAÐIÐ SKIPAÐ FYRI ATKVØÐUGREIÐSLUM, HAR FJEPPARAR VALDU ÁRSINS SPÆLARA, MEN BREIÐ SEMJA TYKIST VERA UM, AT TAÐ HEVUR STØRRI TIGN, TÁ TAÐ ERU LIÐSKIPARAR OG VENJARAR, SUM GREIÐA ATKVØÐU